# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 28. mai 2010, kl. $17^{00}$

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri hevur Jón Mikkelsen boðað frá, at honum berst frá møta á fundinum, og at tiltakslimur fær fundarboð í hansara stað.

Tiltakslimurin Sóleyð Poulsen fekk fundarboð við telduposti tann 19. mai 2010. Hon gav avboð sama dag. Næsti tiltakslimur Jóhan Simonsen fekk fundarboð við telduposti tann 19. mai 2010. Hann gav játtandi svar við telduposti sama dag.

Sambært grein 18, stk. 3, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, skal kommunustýrið gera av, um treytirnar fyri innkalling av tiltakslimi eru loknar.

Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna innkallingina av Jóhan Simonsen sum tiltakslimi.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð:**

**Mál 97**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um umsókn frá Háldan Haldansen um loyvi til at keypa matr. nr. 282am, sum er lendið niðanfyri grundstykki hansara matr. nr. 282i og grannagrundstykkið matr. nr. 282h, ávikavist Heygalíð 13 og 15.
J.nr. 2009-290
Nevndin mælir til at selja honum lendið fyri 250,- kr/fermeturin.

**Viðv. 97**
Pauli T. Petersen setti fram broytingaruppskot um at beina málið aftur í nevnd fyri at gera reglugerð fyri sølupr ís fyri lendi.
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 98**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um fyrispurning frá Herit Joensen og Jónsvein á Rógvu um møguleikan fyri at ognast part av matr. nr. 270 og tann partin av matr. nr. 266a, sum er frá friðaða økinum og út eftir, og sum kommunan herfyri hevur ognast frá SEV. J.nr. 2005-261
Ein minniluti í nevndini, Herit Magnussen, mælir til at halda fast við samtyktina frá fundinum 16. mars 2010, tvs., at tey, afturat parti av matr. nr. 270, kunnu ognast lendi frá eini linju úr niðara innara horni á matr. nr. 270 og út eftir í linju, sum gongur oman úr ytra markinum á matr. nr. 266a – kortskjal nr. 1.
Pauli T. Petersen og Bárður Poulsen taka støðu á bygdarráðsfundinum.

**Viðv. 98**
Á fundinum skjeyt Herit Magnussen upp, at broyta tilmæli hennara frá fundi í Teknisku Nevnd tann 18. mai 2010 til soljóðandi:
Mælt verður til at Herit og Jónsvein, afturat parti av matr. nr. 270, kunnu ognast lendi frá eini linju úr niðara innara horni á matr. nr. 270 (sama linja sum í upprunaliga tilmælinum og út eftir í linju, sum gongur árakað ytra kant á garðinum rundanum matr. nr. 269a (víst við grønum) og harafturat tann part av garðinum, sum liggur uttanfyri matrikkulin (víst við bláum) – víst á kortskjali nr. 3.
Undir viðgerðina av málinum setti Herit Magnussen fram uppskot um at beina málið aftur í nevnd. Uppskotið einmælt samtykt.

# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 28. mai 2010, kl. $17^{00}$

**Mál 99**
Tilmæli frá Havnarnevndini um at koyra grót frá arbeiðinum uppá røktarheimið í hylin innanfyri nýggja havnarøkið – hetta í samband við Gjógvaráætlanina.
Nevndin samtykti at leggja málið fyri bygdarráðið til støðutakan, ímeðan Tekniska deild til fundin kannar, hvat tað kostar at leggja grótið út sambært Gjógvaráætlanini.

**Viðv. 99**
Áðrenn fundin vóru 2 tilboð innkomin. Einmælt samtykt at taka av lægra tilboðnum, sum var frá Sp/f Spektrum.

**Mál 100**
Tilmæli frá Trivnaðar- og umhvørvisnevndini um Ung í arbeiði.
Nevndin mælir til at geva næmingunum úr Vestmanna í 9. flokki í Vestmanna Skúla tilboð um arbeiði í eina viku í part. Víst verður til upprit frá umsitingini, dagf. 18. mai 2010.

**Viðv. 100**
Tilmælið einmælt samtykt.
**Mál 101**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um umsókn um stuðul frá Kvinnuhúsfelagnum og Kvinnuhúsgrunninum um stuðul til virksemið hjá Kvinnuhúsinum-Kreppumiðstøðini.
J.nr. 2009-092
Nevndin mælir frá at stuðla Kvinnuhúsinum-Kreppumiðstøðini.

**Viðv. 101**
Evelyn Gaard setti fram broytingaruppskot um at stuðla Kvinnuhúsinum-Kreppumiðstøðini við 1.000 kr.
Samtykt við fýra akvøðum fyri og trimum blonkum atkvøðum. Evelyn Gaard, Jóhan Simonsen, Herit Magnussen og Siri S. Niclasen atkvøddu fyri. Karl A. Olsen, Pauli T. Petersen og Bárður Poulsen atkvøddu blankt.

**Mál 102**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um umsókn um stuðul til "Summartónar 2010"
J.nr. 2009-110
Nevndin mælir til ikki at stuðla "Summartónum 2010".

**Viðv. 102**
Tilmæli einmælt samtykt.

**Mál 103**
Uppskot til ársroknskap fyri Vestmanna Kommunu fyri 2009.

**Viðv. 103**
Karl A. Olsen mælti til at góðkenna ársroknskapin fyri Vestmanna Kommunu fyri 2009.
Uppskotið einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.00

Sign.:

Karl A. Olsen Herit Magnussen Pauli T. Petersen Jóhan Simonsen

Evelyn Gaard Siri S. Niclassen Bárður Poulsen